## 66% ímóti Icesave

Alt bendir á, at íslendingar fara at vraka Icesave-lógina á fólkaatkvøðuni, sum verður tann 6. mars. Ein nýggj meiningakanning, sum Gallup hevur gjørt, vísir, at 66 prosent ætla sær at atkvøða ímóti lógini. 30 prosent ætla sær at siga ja, og tey seinastu fýra prosentini hava ikki tikið støðu. Kanningin staðfestir eins og undanfarnar kanningar, at flestu íslendingar halda, at tað var rætt av forsetanum at sýta fyri at staðfesta lógina hjá Altinginum. Í kanningini hjá Gallup siga 61 prosent, at forsetin gjørdi tað, sum rætt var.




## Smuglaði rakettir

Ísraelsku myndugleikarnir siga nú, at Hamas-leiðarin, sum bleiv myrdur á einum hotelli í Dubai í síðstu viku, var ein av høvuðsmonnunum aftan fyri vápnasmugling úr Iran til Gaza-geiran. Millum annað skipaði hann fyri at smugla iranskar rakettir til Gaza. Harafturat vilja ísraelsmenn vera við, at Hamas-leiðarin var við til at myrða tveir ísraelskar hermenn í 1989. Palestinskar og aðrar keldur siga, at tað var ísraelska fregnartænastan Mossad, sum myrdi Hamas-leiðaran á hotellinum í Dubai.

# Reisa misálit á Rósu í dag

**Miðflokkurin fer í dag at reisa misálit á Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum, um ikki okkurt heilt álvarsligt hendur**

**POLITIKKUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fríggjadagin staðfesti landsstýriskvinnan nógv umrøddu og illa umstríddu kunngerðirnar um gjald fyri heimahjálp og broyting í kunngerð um heimahjálp.

Fríggjadagin segði Jenis av Rana við Rás2, at lýsti landsstýriskvinnan í almannamálum kunngerðirnar, soleiðis sum teir høvdu hoyrt um tær í fjølmiðlunum, fóru teir í hesari vikuni at reisa misálit á landsstýriskvinnuna.


*Savnsmynd*

Jenis av Rana váttar fyri løtu síðani, at kunngerðirnar eru júst sum teir í Miðflokkinum og andstøðuni sum heild óttaðust, og at teir klokkan 13.30 í dag fara at reisa misálit móti Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu.

- Vit eru klárir við misálitinum, og tað verður lagt fram tá, staðfestir Jenis av Rana, formaður Miðflokksins.

Miðflokkurin hevur verið í samband við hinar báðar andstøðuflokkarnar, Tjóðveldi og Sjálvstýrisflokkin, og báðir sigast taka undir við misálitinum.

- Fríggjadagin tosaði eg eisini við sosial sinnaðar tingmenn í samgonguni, sum als ikki kundu liva við hesum broytingum, staðfestir Jenis av Rana, og leggur afturat, at tað er løgið, um tingmenn eru hart ímóti hesum broytingum, men góðtaka tær alíkavæl.

Í løtuni telur andstøðan í tinginum 13 tinglimir, og skulu sostatt í minsta lagi 4 samgongulimir taka undir við misálitinum, um Rósa Samuelsen skal fella í dag.

Hon kann hinvegin eisini velja sjálv at leggja frá sær.

Høgni Hoydal:

# Átti heldur at verið misálit á samgonguna

**Tjóðveldi heldur at hetta er ikki bert eitt mál um Rósu, men eitt samgongumál, og tí átti eitt misálit heldur at verið móti allari samgonguni**

**POLITIKKUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Men vit taka støðu til hetta misálitið um ella tá tað kemur í tingsalin, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi.

Høgni Hoydal greiðir frá, at enn hevur flokkurin ikki tikið støðu til, um hann tekur undir við misálitinum, sum Miðflokkurin ætlar at reisa í dag klokkan 13.30, um ikki okkur heilt álvarsligt hendur í málinum áðrenn.


*Savnsmynd*

- Men hetta burdi jú heldur verið eitt misálit á alla samgonguna, heldur enn bara móti Rósu Samuelsen, tí hetta er eitt samgongumál, og løgmaður hevur longu greitt tinginum frá, at hesar kunngerðirnar vóru umrøddar í samgonguni fyri hálvum ári síðani, og øll ting- og landsstýrisfólk vóru kunnaði um ætlaðu broytingarnar og tóku undir við tí, greiðir Høgni Hoydal frá.

Hetta gjørdi Kaj Leo Johannsen, løgmaður, tá hann tann 20. januar svaraði einum fyrispurningi frá Annitu á Fríðriksmørk um hvørjar ábendingar løgmaður hevði fingið frá hinum í samgonguni, um, at tey ikki kundu góðtaka hækkaða gjaldið.

Løgmaður greiddi tá, sambært heimasíðunin hjá Tjóðveldi frá, at øll í samgonguni – ongin undantikin – vóru við upp á hækkingarnar, og vóru vitandi um ætlanina alla tíðina, og ikki fyrr enn Rósa Samuelsen hevði lagt ætlanina fram og onnur í samfelagnum reageraðu ímóti, vóru nøkur í samgonguni, sum ynskti málið tikið uppaftur.


*- Um eg taki kunngerðirnar aftur, so mangli eg 4,8 milliónir krónur á almannaøkinum, sigur Rósa Samuelsen*
*Savnsmynd*

Rósa Samuelsen:

# Eg fái ikki gjørt tað øðrvísi

**- Broytingarnar í kunngerðini mugu standa við, tí alternativið er, at eg antin sigi starvsfólk í heimahjálpini upp ella lati okkurt sambýli aftur, og tað kann eg ikki liva við, sigur Rósa Samuelsen**

**POLITIKKUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen, stendur við sína avgerð um at broyta egingjaldið fyri heimarøktina.

- Eg ætli mær einki at gera við hasar kunngerðirnar. Um eina løtu, so fari eg í tingið, og so mugu vit bara síggja, hvat fer at henda. Tað staðfestir Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum.

Hon sigur, at hetta er tað, hon hevur fingið undirtøku fyri í landsstýrinum, og at hon sær ongan annan møguleika enn at lata standa til, sum støðan er júst nú.

- Um eg taki kunngerðirnar aftur, so mangli eg 4,8 milliónir krónur á almannaøkinum. So verði eg antin noydd at siga starvsfólki í heimahjálpini upp, og so fáa tey, sum kanska fáa lítla hjálp nú, als onga hjálp. Eg kann eisini lata eitt sambýli aftur, ella lata vera við at játta pengar til tað. Men hetta eru ikki ting, sum eg kann liva við, greiðir Rósa Samuelsen frá.

### Alternativið er verri

Rósa Samuelsen sigur eisini, at antin má tað koyra sum nú, ella má hon fáa eina eykajáttan.

- Hetta er eitt verri alternativ, og eg rokni heldur ikki við, at nakar flokkur á tingi fer at taka undir við, at siga so nógvum fólki upp ella lata sambýli aftur, sigur Rósa Samuelsen.

Seinnapartin klokkan 13.30 fer Miðflokkurin at reisa misálit móti Rósu Samuelsen, og sigur landsstýrispvinnan, at hon fer í tingið tá, og so má tíðin bara vísa, hvussu leikur fer.